Big Brother barnið til Føroya

Føroyska Sissal og sjeikurin Robert, sum løgdu sínar ástir saman fyri opnum skermi í sjónvarpssendingini Big Brother, eru nú vorðin foreldur. Sonurin, ið hevur fingið navnið Kornelius, er fyrsta barnið, ið er gitið í eini reality-sending, og um knappar 14 dagar kemur hann á vitjan í Føroyum saman við mammu síni

BIG BROTHER BARNIÐ
Eydna Skaale
eydna@sosialurin.fo

Longu áðrenn hann var føddur, var hann kendur, og um knappar 14 dagar kemur fyrsta barnið, sum er gitið í einari reality-sending, á vitjan í Føroyum. Sissal ætlar sær nevniliga til Føroya at vísa føroysku familjuni lítla Kornelius. Kornelius varð føddur í juli, og hann hevur enn ikki verið í Føroyum og heilsað upp á sínar røtur.

Í longri tíð hevur Big Brotherparið roynt at hildið seg burtur frá fjølmiðlunum, og tí hevur lítli Kornelius higartil ikki verið at sæð.

1. oktober kundi BT tó kunngera fyrstu myndina av lukkuligu Big Brother familjuni við føroysku Sissal, danska Robert og lítla Korneliusi.

Lukkulig

Hóast tey fingu eina óvanliga -og kanska ikki serliga romantiska og ævintýrkenda byrjan uppá parlagið, so hava tey prógvað, at tey klára skerini, so hvørt sum tey koma.

Við lítla Korneliusi er kærleikin teirra millum bara vaksin, og hóast nógv mundu ivast, áðrenn barnið varð føtt, so hava ungu foreldrini prógvað, at tey megna uppgávuna til fullnar.

Eftir buldraligu byrjanina inni í Big Brother húsinum, vóru tey uttan iva sera fá, ið roknaðu við, at Sissal, Robert og barnið nakrantíð fóru at enda sum ein lukkulig kjarnufamilja.

Men sambært BT er tað júst tað, tey nú eru.

– Vit eru sera, sera lukkulig, og Kornelius er ógvuliga róligur og deiligur, sigur 21 ára gamla Sissal, sum trívist sera væl í nýggja leiklutinum sum mamma.

Hóast tey bæði Sissal og Robert ikki júst eru kend fyri at vera ábyrgdarfull og búgvin, so hava tey væl og virðiliga gjørt allan óndsinnaðan slatur til skammar, við at prógva, at tey eru vaksin við stóru uppgávuni at gerast foreldur.

Robert, sum er 22 ára gamal, tekur ábyrgdina sum familjumaður í stórum álvara, og hann fer nú í gongd við at gera útbúgvingina sum IT-verkfrøðing lidna, soleiðis, at hann kann taka sær av familjuni. – Tað er jú dýrt at hava eitt lítið barn, sum hann sigur.

Sissal kann njóta at vera heimagangandi mamma nakað afturat, men eisini hon hugsar um útbúgving. Hon var í læru sum frisør, tá hon fór við í Big Brother sendingina, og nú ivast hon í, hvørt hon skal taka frisørútbúgvingina uppaftur ella hon skal gerast stewardessa, sum hon altíð hevur droymt um.

Um hon hevði fingið arbeiði hjá Atlantic Airways, hevði hon sæð munandi meiri til familju sína her heima, og tað er avgjørt ein lokkandi tanki fyri hana.

Meðan heimurin hugdi

Tað vóru mong, ið fylgdu við í Big Brother sendingini, tá hon fyri einum ári síðani varð send. Summi vóru enntá so áhugað, at tey keyptu sær sonevnda Big Brother kanalina, sum sendi beinleiðis frá Big Brotherhúsinum 24 tímar um døgnið.

Føroyska Sissal Frihsdal setti av álvara dám á sendingina, og hon gjørdi tað kanska serliga spennandi hjá føroyingum at hyggja.

Við øllum tí hon segði og gjørdi, helt hon á at skelka hyggjararnar, og meiningarnar um hana vóru sera nógvar.

Øll tosaðu um Big Brother sendingarnar og serliga skandalirnar sum vóru, tá Sissal m.a. kastaði sær av vatninum á gólvið, rakaði sær í neðra og annað frammanfyri opnum skermi. Hetta varð viðgjørt bæði í donskum og føroyskum fjølmiðlum.

Størsti skelkurin kom tó, tá Sissal byrjaði at fjasast við Robert, og tá tey bæði, hin 10. oktober í fjør, endaðu undir somu dýnu, meðan allur heimurin kundi fylgja við í teirra ástarleiki.

Hetta fekk eisini vanliga føroyingin at taka penn í hond, og fleiri lesarabrøv vóru í føroysku bløðunum um hetta mundi, ið viðgjørdu Sissal og Big Brother húsið. Summi vóru dømandi, og søgdu, at hon var eitt ræðuligt umboð fyri føroysku tjóðina, meðan onnur skýrdu Sissal at vera eitt friskt ískoyti til ein annars gráan gerandisdag.

Sissal sjálv hevur ongantíð latið seg ávirkað av øllum tosinum um hana, men hevur staðið við sítt og sína persónligheit.

Hóast fá høvdu roknað við tí, so hildu Robert og Sissal tó saman, eisini eftir at sendingin var liðug, og brátt varð kunngjørt, at famøsi ástarleikurin hevði givið úrslit, tí Sissal varð vorðin við barn.

Síðani tað hava Robert og Sissal fleiri ferðir verið í Føroyum á vitjan, og eisini hava tey arbeitt í barrunum í náttklubbunum í Havn.

Síðani lítli Kornelius varð føddur, 17. juli í ár, hava tey tó ikki verið heima á klettunum aftur. Um knappar 14 dagar fær føroyska familjan tó høvi at síggja lítla eygnasteinin, tá Sissal kemur heim til Føroya við Korneliusi, sum allarhelst ikki fer at vera einabarn serliga leingi. Sissal og Robert siga seg nevniliga fegin vilja hava nógv fleiri børn saman í framtíðini.

So nakað av einum ævintýri varð tað kanska, hóast alt...

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag

Vika 41, 2004
www.kaupthing.fo

Oljugoymslurnar hækkaðu

MARKNAÐARRÁK

Oljan, sum veruliga hevur verið í andglettinum í seinastuni, varð aftur sera týðandi fyri figgjarmarknaðirnar í farnu viku. Orsøkin er, at oljuprísurin tá náddi hægsta stiginum í yvir 20 ár. Vikuliga verður uppgjørt hvussu oljugoymslurnar í USA broytast. Meðan oljugoymslurnar javnt og samt eru lækkaðar seinastu vikurnar, so hækkaðu goymslurnar hinvegin við 3,4 milliónum tunnum fyri viku síðani. Hetta var jaligt, og fekk oljuprísin at lækka nakað. Kortini liggur oljan framvegis á methøgum stigi.

Farna vika var eisini merkt av bjørtum búskapartølum. M.a. var endaliga talið fyri BTÚ-vøksturin í 2. ársfj. í USA dagført úr 2,8% í 3,3%. Samstundis lækkaði prísvøksturin ikki sum óttað varð, men gjørdist 3,2% sum væntað. Av tí at ótti hevur verið fyri, at oljan skuldi ávirka BTÚ-vøksturin skeiva vegin, og av tí at Alan Greenspan hevur verið minni dapurskygdur um hækkandi prísvøkstur, so hækkaðu lánsbrævarentur og partabrøv av hesum.

Størsta hendingin hesa vikuna verður fríggjadagin, tá sera týdningarmikla arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin úr USA verður kunngjørd. Seinasta mánaða var hendan jalig og væntað verður sum heild, at 150.000 arbeiðspláss vóru sett á stovn í september. Orsakað av óndnum sum hava herjað í USA, verður frágreiðingin torfør at tulka. Onnur búskapartøl benda á, at vøl hevur gingist á arbeiðsmarknaðinum. Møguleiki er tí fyri einari bjartari frágreiðing, sum kann fáa lánsbrævarentur og partabrøv at hækka.

Fríggjadagin kemur fyrsti týðandi roknskapurin fyri 3. ársfjórðing, tá risafyritøkan úr USA, General Electric (GE), leggur fram síni tøl. Væntað verður, at inntøkan hjá GE verður góð. Áhugavert verður hvat GE sigur um sítt vindmylluvirksemi, tí hetta kann ávirka Vestas.

Hesa vikuna hevur evropiski miðbankin (ECB) eisini rentufund. Tey fara ikki at broyta rentustigið. Fíggjarmarknaðirnir verða í biðistøðu til fríggjadagin, men Kaupthing væntar, at partabrøv og lánsbrævarentur kunnu hækka hesa vikuna, men hetta avger arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin úr USA.

Rentur

	Renta	+/- %-stig
Diskonto	2,00%	0,00%
2 ára lánsbræv	2,56%	0,01%
5 ára lánsbræv	3,50%	0,06%
10 ára lánsbræv	4,35%	0,07%

Partabrævavísitøl

	Kursur	+/- %
KFX, Danmark	285,7	3,1%
OMX, Svøríki	723,3	4,3%
Eurostoxx 50, Evropa	2.829,5	3,8%
S&P 500, USA	1.131,5	2,5%

Íløgufeløg

	Kursur	+/- %
Lánsbrøv í DKK	106,41	0,0%
Evru Lánsbrøv	168,45	-0,1%
Norrøn Partabrøv	84,32	3,9%
Altjóða Vøkstur	60,26	-1,2%

Gjaldoyru

	Kursur	+/- %
USD	601,11	-0,7%
EUR	744,11	0,0%
GBP	1.079,22	-1,4%
NOK	89,79	1,1%

Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.

Hvat so um tað eru sjey Robin Hood'ar

Í ansingarstovninum Mylnuhúsið í Klaksvík arbeiða tey í sokallaðum sporum. Hetta merkir, at tey eygleiða børnini fyri at vita, hvat hugtekur tey mest, og gjøgnum prát við børnini verður gerandisdagurin á stovninum myndaður. Fríggjadagin og leygardagin varð ráðlegging hildin, har ljóskastarin var settur á nevniliga henda arbeiðsháttin

BARNAANSING
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

Klaksvík:
Í sambandi við árliga ráðleggingardagin hjá Mylnuhúsinum hevði leiðarin Hanna Thøgersen boðið einari dansktalandi, italienskari kvinnu til Føroya at halda skeið fyri starvsfólkunum. Kvinnan, sum eitur Daniela Cecchin, er útbúgvin pedagog í Italia og seinni sálarfrøðingur í Danmark. Hon hevur skrivað eina bók, sum eitur Den integrerende baggrund. Henda bókin er eitt amboð til teir stovnar, sum í dag arbeiða við teimum sokallaðu sporunum, ið tey fáa við at eygleiða barnið og tess áhugamál.

Nógv kom burturúr hesar báðar dagarnar, og Daniela heldur, at starvsfólkið í Mylnuhúsinum er á rættari leið í teirra arbeiðsháttum.

– Teimum manglar bara viðhvørt at fáa børnini við, sigur hon.

Leiðarin á Mylnuhúsinum, Hanna Thøgersen og Daniela Cecchin. Samstarvið teirra millum byrjaði, tá Hanna og ein onnur gjørdu uppgávu um Den integrerende baggrund. Hetta eru aðru ferð, at Daniela vitjaði í Føroyum og helt skeið

Barnanna veruleiki

Sum eitt dømi kann nevnast ein verkætlan sum tey elstu barnagarðsbørnini arbeiða við fyri tíðina. Tey hava gjørt av at fara at spæla sjónleikin um Robin Hood. Undir skeiðinum kom tó fram, at starvsfólkini, sum eru um hesi børnini, ivaðust í, um tey høvdu megnað at fáa børnini við. Tí tá tey byrjaði at venja leikin, vísti tað seg, at áhugin hjá børnunum fyri hesari verkætlanini dalaði sera skjótt.

Eini sjey børn vildu vera Robin Hood. Øll vaksin vita, at tað er bara ein Robin Hood, og tað mátti so sigast fyri børnunum.

Men har er tað, at Daniela traðkar inn og spyr: Hvat so um tað eru sjey Robin Hoodar.

– Í hugaheiminum hjá børnunum kann tað gera tað sama, hvussu nógvir Robin Hood vóru. Um tað er tað, sum tey hava hug til, jamen, so er at royna tað. Tað ræður um at finna tað, sum hevur týdning fyri børnini, og hugtekur tey fyri at halda teimum til. Og um tað so merkir, at í teirra veruleika eru tað sjey Robin Hoodar, so bilar tað onki, heldur hon.

Hetta dømið oman fyri kann vísa rættiliga týðuliga, hvussu upptikin vaksin fólk eru av, at fakta og onnur viðurskifti altið eru rætt, men hugaheimurin hjá børnunum loyvir nógv meira. Hetta kann sjálvandi gera sítt til, at tað er trupult hjá børnum og vaksnum at tosa saman, men eftir skeiðið hjá Danielu, søgdu fleiri starvsfólk, at hon hevði megnað at víst teimum, at tey eru á rættari leið í teirra arbeiði. Samstundis megnaði hon eisini at geva teimum nøkur amboð at arbeiða víðari við.

Barnaperspektiv

Den integrerende baggrund snýr seg fyrst og fremst um, at starvsfólk, sum dagliga eru um børnini, læra at skapa samband millum tey sjálvi og barnið. Og at tilrættisleggja dagin á stovninum saman við børnunum.

Hetta er, sambært Danielu Cecchin, ongin trupulleiki, um ein hevur fingið tey røttu amboðini til tess at kunna virka á ein tílíkan hátt.

Daniela greiðir frá, at við at eygleiða barnið, fær starvsfólkið eina fatan av, hvat veruliga hugtekur barnið, hvat tað tímir, evnar og rúmar. Sokallað spor. Útfrá sporunum frá teim ymsu børnunum, kunnu tey so lættliga fáa barnið við í tilrættisleggingina av degnum, um barnið bert merkir, at tað verður tikið við í arbeiðið.

– Tað ræður um at læra seg at síggja tað út frá einum barnaperspektivi, leggur Daniela dent á. Men sjálvandi skal barnið heldur ikki avgera alt, heldur hon fram. Tað ræður um at finna javnvágina ímillum, so at tað ikki er bara tann vaksni, sum ger av, men so sanniliga heldur ikki bara barnið.

– Javnvágina finnur eitt starvsfólk í gjøgnum ein dialog við barnið. Bæði siga, hvat tey kundu hugsað sær, og at enda verður so funnið fram til eina felagsloysn, greiðir Daniela frá.

Daniela Cecchin fer enntá so langt sum at siga, at sætt við politiskum eygum er hetta tann rætti vegurin til at menna og læra eitt barn til at liva í einum demokratiskum samfelag, har samstarv og dialogur eru nøkur av lyklaorðunum.

Broytingar

Daniela ivast ikki í, at broytingar fara at koma í gerandisdagin í Mylnuhúsinum eftir hetta skeiðið.

– Útfrá tí, sum vit hava tosað um, og sum starvsfólkið hevur reagerað uppá, so vænti eg, at onkrar broytingar fara at koma beinanvegin, meðan aðrar kanska koma so líðandi, sigur hon.

Spurd, um hetta at barnið verður upplært við, at tað allatíðina skal takast við upp á ráð, ikki fer at merkja, at tað verður forkelað og vil hoyrast, svarar Daniela avgjørd absolutt ikki.

– Børn duga væl at skyna á ymiskar støður. Tey vita, at okkurt, sum ein ger heima, ger ein ikki í barnagarðinum og øvugt. Tað sama læra tey, hvussu ein ber seg at til veitslur ella hvat tað nú skal vera. Tað ber eisini væl til at læra eitt barn, at tað eru nøkur ting, sum mamma og babba bestemma uttan kjak, sigur hon.

Men sjálvandi kann tað altið vera, at onkur børn fara at stilla krøv um at verða hoyrd heima við hús, tí tey eru von við tað frá gerandisdegnum í barnagarðinum, leggur Daniela brosandi afturat.

Fantastiskt skeið

Starvsfólkini í Mylnuhúsinum, bæði pedagogar og hjálparar, lata sera væl at skeiðinum.

– Tað ber illa til at seta orð á alt tað, sum vit hava fingið burturúr. Men jú, tað er rættiliga nógv. Hetta hevur verið so spennandi og læruríkt, siga tey.

Tey rósa Danielu Cecchin upp um øll skýggj, og tað týdningarmesta, sambært teimum er, at tey hava lært, at tað er týdningarmikið at síggja veruleikan hjá børnunum.

– Eitt er hatta dømið um Robin Hood. Men eitt annað er so, at eitt barn vil mála eina grøna borg. So siga vit vaksnu beinanvegin, at ein borg er grá. So er spurningurin aftur har: Hví kann ein borg, sum eitt barn ger, ikki vera grøn, siga starvsfólk í Mylnuhúsinum, sum vælnøgd fóru heim leygardagin eftir tveir spennandi ráðleggingardagar saman við italienska sálarfrøðinginum og pedagoginum, Danielu Cecchin.

Hepnar gentur sluppu væl

Sunnunáttina hendi eitt ferðsluóhapp á Vatnavegnum í Vágoynni. Ein bilur við tveimum ungum gentum fór av ókendum orsøkum út av vegnum og rendi við síðuni inn í ein stóran stein. Bilurin fór illa, men genturnar fingu lítlan og ongan skaða.

Vakthavandi á løgreglustøðini í Miðvági sigur, at genturnar vóru hepnar at sleppa so væl frá óhappinum.

– Bilurin fór í knús, so tær vóru sera hepnar, sigur vakthavandi.

Onki bendir á, at ov nógv ferð ella rúsdrekka vóru orsøkin til óhappið. Løgreglan er tó ikki liðug at gera kanningar í málinum, men fyribils er orsøkin altso ókend.

- sae –

Smáttaríir í Klaksvík

Nakað av herverki, rúsdrekkakoyring og leysgangandi hundar hava verið trupulleikar hjá løgregluni í Klaksvík.

Fríggjadagin varð ein bilførari tikin fyri at koyra við kenning. Herverk varð eisini framt á nakrar bilar. Dekk vórðu uppskorin á einum, og somuleiðis vórðu onkrir bilar skøvaðir.

– Umframt hetta, so hava vit somuleiðis fingið fráboðanir um leysar hundar. Tað er eisini ein aftur vendandi trupulleiki, sigur vakthavandi í Klaksvík.

- sae –

Harðskapur í trimum førum

Løgreglan í høvuðsstaðnum letur væl at vikuskiftinum, hóast rættiliga nógv fólk hevur verið í býnum.

– Vit hava tríggjar harðskapssakir, har persónar hava fingið framman á. Bert í tí eina førinum hava vit ikki funnið gerningsmannin, sigur vakthavandi.

Ein bátur fór úr Nólsoy leygardagin, har menninir umborð vóru fullir. Tá teir komu til Havnar, stóð løgreglan fyri teimum.

– Tað er viðhvørt, at løgreglan tekur ímóti endanum, sigur vakthavandi og leggur afturat, at fyri uttan hesi dømini, hevur tað verið á einari leið í Havn um vikuskiftið.

- sae -